

ILLUSTRATIÓN: SOSIALURIN

FAKTA **GUNNAR WETTERBERG**

57 ár og útbúgvin søgufrøðingur. Hann hevur granskað og skrivað fleiri søguligar bøkur, og hann hevur verið í uttanríkistænastu fyri svenska statin. Hann er nú granskingarleiðari í Saco, sum er ein samanrenning av fleiri svenskum fakfeløgum fyri akademikarar.



# Føroysk ósemja um uppskotið

- HUGSKOTIÐ ER VERULEIKAFJART, SIGUR FØROYSKUR SAMBANDSMAÐUR, MEÐAN FORMAÐURIN Í TJÓÐVELDI SIGUR TAÐ VERÐA EIN STÓRAN FYRIMUN FYRI FØROYAR



## **Veruleika**fjart

Helgi Abrahamsen er tingmaður fyri Sambandsflokkin. Hann heldur, at hugskotið um eitt norðurlendskt samveldi er áhugavert fyri ein søgufrøðing, men tað er samstundis veruleikafjart.

- Norðurlond hava nógv til felags. Umframt søguna, mentanina, vælferðarskipanirnar, líkjast málini nógv. Wetterberg vísir hinvegin á serliga at skipa ein felags uttanríkispolitikk. Norðurlond er ósamd og draga ikki eina línu á tí økinum. Tvey av londunum eru í EFTA og ætla sær ikki í ES. Svøríki er ikki partur av NATO, og Noregi er argasti fíggindin hjá føroyingum og íslendingum í fiskivinnusamráðingunum. Alt byrjar við einum hugskoti, men eg dugi ikki at síggja, at eitt norðurlendskt samveldisríkið verður veruleiki næstu árini, sigur Helgi Abrahamsen.

## **Stórur** fyrimunur



Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi, hevur altíð tikið fult og heilt undir við hugsjónini um eina veruliga samgongu millum Norðurlond. Hann heldur, tað hevði verið ein stórur fyrimunur fyri Føroyar politiskt, búskaparliga, mentanarliga og sosialt, um norðurlendska samstarvið hevði verið ment til eina veruliga samgongu ella eitt samveldislíknandi samstarv.

- Hugsjónin hjá Wetternberg er ikki í andsøgn við fullveldishugsjónina í Føroyum. Tað er ein misskiljing, at ein sjálvstøðug tjóð er einsamøll og avbyrgd frá umheiminum. Veruleikin er tann øvuti. Ein sjálvstøðug tjóð og egið fullveldi er fortreytin fyri at taka lut í altjóða samstarvi ella á jøvnum føti í samveldum ella øðrum skipanum, eins og ES-londini, sigur Høgni Hoydal. Hann leggur afturat, at um eitt norðurlendskt samveldi skal skipast sum ein føderasjón ella sum eitt leysari samveldi millum statir, ber altíð til at kjakast um. Fyrimunurin er eyðsýndir, og grundgevingarnar truplar at finna, sambært formanninum í Tjóðveldi.

- Tað hevði heilt víst gagnað føroyska samfelagnum at verið við í einum norðurlendskum samveldi. Ísland og Danmark kenna nógv til føroysk viðurskifti. Føroyar høvdu hinvegin knýtt seg nærri at Finnlandi, Noregi og Svøríki, og tað eru bara fyrimunir við, at onnur fáa áhuga fyri føroyingum, heldur Høgni Hoydal.